Óli missir málverjan

Men Hvidovre hevur yvirtikið besta málverjan í felagnum hjá Øssuri Hansen

1. DEILD DANMARK
Jóannes Hansen

Tað gongst ikki væl hjá Hvidovre og B93, sum ávikavíst Óli Johannesen og Øssur Hansen spæla við.

Í vikuskiftinum vóru Óli Johannesen og teir í Århus, og har vann heimaliðið, FC Århus, 2–1. Hvidovre kom á odda í trettanda minutti, men í 2. hálvleiki sóu teir 350 áskoðararnar heimaliðið skorað tvær ferðir. Teir javnaðu í 65. minutti, og teir skoraðu sigursmálið tveir minuttir undan leikloki.

B93 hevði torføran setning hesa ferð. Teir vóru í Haderslev, har HFK Sønderjylland stríðist fyri at endurvinna plássið, sum teir í summar mistu í superliguni. Áhugin fyri liðnum har suðuri tykist framvegis at vera stórur. Tað vóru 1.588 áskoðarar, og teir sóu heimaliðið vinna 3–2.

Skifta málverja

Tá Hvidovre var í Århus, var besti málverjin hjá teimum leikbannaður, tí hann varð útvístur næstsíðsta vikuskifti. Málverjin eitur Stephan Andersen. Talan er um ein so mikið góðan málverja, at hann er U–21 landsliðsmálverji.

Nú frættist, at tað eru onnur enn danir, sum hava lagt til merkis, at Hvidovre hevur ein góðan málverja. Feløg í Onglandi og Hollandi eru áhugað at keypa málverjan, og millum áhugaðu feløgini verður Bolton nevnt. Í hesum felagnum í bestu eingilsku deildini eru frammanundan tríggir danskir spælarar – Bo Hansen, Per Frandsen og Henrik Tømrer Petersen.

Hvidovre er kent fyri at ala góðar málverjar. Eitt dømi um hetta er Peter Schmeichel, sum vardi Hvidovre málið, áðrenn hann fór at spæla við Brøndby og síðani varð seldur til Manchester United.

Hvidovre hevur longu syrgt fyri at tippa holið, sum kanska fer at koma millum stólparnar. Teir hava plaserað Svarta Per hjá Øssuri Hansen og B93. Felagið á Eysturbrúgv er í svárari kreppu. Teir hava givið spælarunum loyvi at skifta felag, um nakar vil hava teir, og undan vikuskiftinum flutti besti málverjin, Nicolas Nielsen, til Hvidovre.

Farum vil upp

Í toppinum í næstbestu deildini styrkti Farum um sína støðu. Tað vil siga, at tað eru góðir møguleikar fyri, at superligu fótbóltur verður í Farum, um so Lyngby flytir norður hagar ella ikki. Farum vann topp-dystin á heimavølli ímóti Frem úr Valby við 2–1.

Randers Freja hevði vitjan av næstan hundrað ára gamla stórfelagnum úr Odense, B1909, og tað endaði 1–1.

SÍ-ÍF 3-0 (25-11, 25-6, 25-12):

Botnliðið lagt seg á odda

Flogbóltur, menn: Føroyameistararnir ÍF fóru illa mannaðir til Sørvágs at spæla móti nógv umrødda SÍ-liðnum, sum hevur góðan møguleika at gera seg galdandi í toppinum. Leygardagin hølvaðu teir ÍF av

FLOGBÓLTUR
Emil Lisberg Jacobsen

Sørvingar eru her avmyndaðir eftir sigurin í Fleyrkappingini, og nógv bendir á, at hetta neyvan verður tann seinasti á árinum
Mynd: Jákup á Stongunum

Um vit hyggja eftir settúrslitum, so var mest sannførandi sigurin av øllum í fyrsta umfari av meistaradeildunum hjá monnum og kvinnum tann hjá SÍ móti ÍF. Sørvingar vunnu 3-0 og vunnu øll settini stórt.

Hetta er rættiliga merkisvert, tí seinasta kappingarár var SÍ púra einsamalt í botninum, meðan ÍF lá í toppinum og endaði sum føroyameistari. Men tá tað er sagt, skal beinanvegin leggjast afturat, at bæði liðini síggja nógv øðrvísi út í dag samanborið við fyri einum ári síðani.

Hjá SÍ sær tað sera spennandi út. Teir hava fingið Borko Ilic sum leikandi venjara, og harumframt er Rajko Petrovic, sum spælir á diagonalinum, komin til Sørvágs úr Jugoslavia. Og tá SÍ so eisini hevur leikarar sum Jón Nielsen og Suna Hansen, er talan um eitt sterkt lið.

ÍF hevði tríggjar heilt ungar leikarar við til Sørvágs. Av teimum, sum í fjør vóru við til at vinna gull, er Odd Eliassen tann, sum størst saknur man vera í. Hann er farin av landinum, og leygardagin spældi beiggi hansara Bartal hevari í hansara stað. Boban Ilic kom til landið fríggjadagin, og tað sigur seg sjálvt, at tað er eitt sindur møtumikið at skula spæla dyst longu dagin eftir.

Annars er ikki so nógv at siga um dystin. Settúrslitini siga tað mesta sum sigast skal, og tað verður áhugavert at fylgja SÍ í vetur.

Okkurt rumblar á Tvøroyri

Tá eitt ítróttarlið fær góð úrslit, virkar tað mennandi á nógvum økjum. Á Tvøroyri er áhugin fyri flogbólti vaksin nógv hesi seinastu árini, og nú TB hevur fingið útlendskan styrk, er væl hugsandi, at áhugin fer at økjast enn meira. Og tað er positivt fyri allan býin

FLOGBÓLTUR
Emil Lisberg Jacobsen

Tey, sum fylgja við í føroyskum ítrótti, kenna væl TB. Ítróttarfelagið, sum varð stovnað í 1892, er tað elsta í landinum og eigur sítt egna pláss í føroyskari ítróttarsøgu.

Tað er fyrst og fremst fótbóltur, fólk hugsa um, tá TB verður nevnt. Serliga í 70-árunum og fyrst í 50-árunum gjørdi TB um seg á fótbóltsvøllinum, og higartil hevur felagið vunnið føroyameistaraheitið í mansfótbólti sjey ferðir, seinast í 1987. Seinastu árini hevur TB ikki verið partur av føroysku fótbóltselituni, men í ár eydnaðist tað so at vinna 2. deild og flyta upp aftur í bestu deildina.

Samstundis sum tað hevur gingið niður á bakka við fótbóltinum á Tvøroyri, hevur felagið lagt seg eftir at menna flogbóltin á staðnum – serliga kvinnuflogbóltin.

Gudrid Nolsøe og Juanna S. Joensen munnu vera kendastu flogbóltsnøvnini av Tvøroyri. Seinastu árini hava tær báðar spælt í Danmark og hava staðið seg væl.

Her heima í Føroyum hevur TB ongantíð verið føroyameistari í flogbólti, men tað er heldur ikki fyrr enn seinastu árini, at TB av álvara er farið í holt við at skapa traditiónir innan flogbóltin.

Okkurt árið hevur TB verið væl við í kappingini, men í ár sær út til, at tað er serlig grund til bjartskygni. Fyrsta teknið um, at TB ætlar sær okkurt í ár, kom næstsíðsta vikuskifti, tá tær leikandi lætt vunnu Fleyrkappingina í Havn, og næsta teknið kom í Klaksvík leygardagin, tá tær eyðmýktu Mjølnir 3-0 í Klaksvík.

Fremsta orsøkin til, at tað hevur gingið so væl hjá TB í seinastuni, er, at felagið hevur fingið dugnalig útlendsk fólk til liðið. Emanuele Leoni úr Italia er venjari, og við sær hevur hann 34 ára gomlu Lilian Popescu úr Rumenia. Harumframt er 20 ára gamla Maja Popovich úr Bosnia-Hersegovina komin á liðið. Hóast sín unga aldur hevur hon longu roynt seg á hægsta stigi bæði í Týsklandi og Italia, og bæði hon og Popescu hava longu vístsínar dygdir. Dygdir, sum kunnu føra TB langt í ár. Maja Popovich er annars systir Marinu Popovich, sum er leikandi venjari hjá Drátti.

Tær hava gott eyga fyri spælinum og kunnu geva føroysku leikarunum á liðnum eina rúgvu.

Stórur áhugi

Tað sigur seg sjálvt, at áhugin á Tvøroyri fyri flogbólti er vaksandi í hesum døgum. Serliga millum børnini er undirtøkan stór, bæði millum gentur og dreingir. Enn er flogbóltur á Tvøroyri fyrst og fremst ein kvinnuítróttur, men ein av málsetningunum hjá felagnum er eisini at menna áhugan millum mannfólkini. Felagið hevur einki lið í teimum vaksnu deildunum hjá monnum, og vit skulu heilt niður til Dreingir 16 fyri at finna eitt TB-lið á manssíðuni. Sum við øllum øðrum ítróttum er tað gongdin hjá teimum vaksnu liðunum, sum hevur nógv at siga fyri áhugan hjá teimum yngru, so her skuldi ligið væl fyri. Og í mun til aðrastaðni hevur TB heldur ikki hina stóru føroysku vetrarítróttargreinina, hondbóltin, at kappast við.

Áhugin millum fólk er eisini stórur, nú felagið hevur satsað við at fáa útlendskan styrk. Hetta við at fáa útlendskar leikarar til landið er ofta sum eitt lottarí. Summir fella ikki til, aðrir fáa skaðar, og uppaftur aðrir liva stutt og greitt ikki upp til vónirnar, sum eru settar til teir. Her hevur flogbólturin verið munandi hepnari enn bæði fót- og hondbólturin, og tað sær eisini út til, at TB hevur valt rætt. Tí umframt at tað ger sjálvt liðið betri, nørir tað eisini um áhugan fyri liðnum og ítróttinum, og tað er ein stórur partur av vinninginum. Tey ungu fáa betri hug at íðka ítrótt, og um liðið fær góð úrslit, er tað eisini mennandi fyri sjálvan býin, sum fær nakað positivt at standa saman um. Hetta hava vit sæð so nógva aðrastaðni, og tað er nógv sum talar fyri, at vit eisini fara at síggja tað á Tvøroyri í nærmastu framtíð.

VB-VÍF 17-22 (8-7):

VB misti takið á meistarunum

Í longum løtum var VB sera væl við í dystinum móti VÍF, men í seinna hálvleiki fekk VÍF átta mál á rað og avgjørdi harvið dystin

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Meistararnir úr VÍF fingu ein ordans hvøkk, tá tær sunnuadgin vitjaðu í Vági.

At dysturin var torførur, var einki at ivast í, men neyvan høvdu tær í VÍF grunað, at tað skuldi gerast somikið torført, sum tað bleiv.

Jacklin var bjargingin

VB var liðið, sum hevði munin meginpartin av dystinum, og eftir at hava fört við einum máli í hálvleikinum, komu tær tíðliga í seinna hálvleiki upp á 14-10, og sigurin tóktist vera komin heilt nær.

VÍF fekk tó snarað øllum á høvdið, tá tær innan fyri 11 minuttir skutu átta mál á rað, og á liðnum tykist ikki vera ivi um, at var tað ikki fyri hesa løtuna, so hevði dysturin verið taptur.

- Fram til tá hekk spælið hjá okkum als ikki saman. Talan var um fyrsta dystin, og tá hesin so eisini var tann á pappírinum torfør asti dysturin, sum vit kundu fáa, so gav hetta okkum eyka nervar, sigur Jórun Ludvig, sum í ár er á liðnum hjá VÍF.

- Hasa løtuna í seinna hálvleiki fingu vit tó knappliga alt at rigga, og ikki minst var tað Jacklin, sum bjargaði okkum. Eg haldi næstan, at hon skoraði upp á allar royndirnar hja sær, og tað er púra víst, at var tað ikki fyri hana, so høvdu vit tapt dystin, sigur Jórun.

Má ikki vaksa

Saman við liðfeløgunum kann hon tó fegnast um, at tað hóast alt eydnaðist VÍF at vinna dystin. Sum nevnt, so var hetta helst tann á pappírinum torførasti dysturin, og at fáa tvey stig í slíkum, er so avgjørt ikki at forkasta.

At VB-kvinnurnar hinvegin munnu iðra seg, er einki at taka seg aftur í. Tær hvødu fram til gyltu løtuna hjá VÍF takið dystinum, og fleiri vóru helst, sum vónaðu og roknaðu við, at VÍF fyri fyrstu ferð í meira enn eitt heilt ár skuldi tapa ein landskappingardyst.

Soleiðis gjørdist ikki, men hinvegin sýndi avrikið hjá VB, at tær hels verða sera drúgvar hetta kappingarárið, og einki er at ivast í, at tær fara at stríðast fyri, at munurin til VÍF ikki skal gerast størri enn tey bæði stigini, sum eru.

Dysturin í tølum:

VB-VÍF 17-22 (8-7)
Málskjúttar:
VB: Gabriella Fekete 9(3), Regina Radó 3, Gurið Mortensen 2, Margret Augustinussn 1, Durita Rouch 1, Sólrun Krosslá 1
VÍF: Jacklin Durhuus 7, Sóley Mikkelsen 4, Nicoleta Radu 3, Fríða Marjunardóttir 2, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 2, Jórun Ludvig 2, Ioana Rápa 1, Alis Høghamar 1
Brotskøst: VB 4, VÍF 3
Útvísingar: VB 2, VÍF 1
Dómarar úr Kyndli: Uni Wardum & Hannis Wardum

KÍF-VÍF 19-32 (7-13)

Eingir trupulleikar

Talan var ikki um meistaraspæl frá meistarunum, men tað var kortini ríkiligt til at basa kollfirðingunum

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Vestmenningar settu sunnudagin sjøtul á sítt kappingarár, tá teir á útivølli – í Vestmanna – vunnu ein tryggan sigur á Kollfirðingum.

Rótut

Sum skilst á lagnum, so var talan tó ikki um nakað meistaraspæl frá gullvinnarunum. Serliga í fyrra hálvleiki var dysturin rættiliga rótutur, men tað eydnaðist tó kortini vestmenningum at vinna sær eina hampuliga leiðslu áðrenn steðgin.

Munurin í steðginum var sum kunnugt seks mál, og tá so vestmenningar nýttu fyrstu løtuna av seinna hálvleiki til at skjóta fimm mál á rað, var dysturin í roynd og veru avgjørdur. Kollfirðingar fingu eitt sindur betri skil á, eftir at hava gjørt nýtslu av einum time-out, men nærhendis vestmenningurm komu teir ongantíð.

Týdningarmikil sigur

Fyri VÍF mundi týdningurin av úrslitinum vera nógv størri enn týdningurin av spælinum. Stigini eru jú tey, sum telja, og onkur kundi kanska borið ótta fyri, at kollfirðingar fóru at gera okkurt sprell móti meistarunum. Ikki minst tí hesir skulu til at finna sær tveir nýggjar vengir, nú bæði John Zachariasen og Martin Hummeland eru staddir uttanlanda.

Kollfirðingar megnaðu tó ikki at gera nakað stórvegis, og nú teir hava leikt tveir dystir, eiga teir framvegis fyrsta stigið tilgóðar.

Í fjør var støðan nakað líknandi, og tá var tað ikki fyrr enn í seinnu kappingarhálvu, at teir fóru at gera um seg, men tá var ov seint til at hugsa um heiðursmerki. Skal sama gongdin ikki endurtaka seg í ár, verður helst neyðugt við nøkrum stigum nakað skjótt.

Dysturin í tølum:

KÍF-VÍF 19-32 (7-13)
Málskjúttar:
KÍF: Iljan Topic 5, Regin Petersen 5, Jákup Dam 3(3), Kristian Madsen 2, Finn Heri Johannesen 2, Vagnur Johannesen 1, Durica Tomic 1
VÍF: Sámal Joensen 8, Agnar Joensen 8, Danut Negro 8(2), Ragnar Zachariasen 5, Ingi Olsen 4
Brotskøst: KÍF 5, VÍF 2
Útvísingar: KÍF 5, VÍF 8
Dómarar úr Tjaldri: Trúgvi Mortensen & Kári Hansen